


www.oljan.fo

**Jan Müller** 21 - 02 - 2013

# Atlantic Petroleum veksur um oljugoymslurnar

Atlantic Petroleum hevur fingið endaliga góðkenning at keypa seg inn í ta fyrstu av tveimum bretskum útbyggingarleiðum, ið væntandi fara í framleiðslu í 2014 og 2015. Hetta verður gjørt fyri at økja um goymslurnar og framleiðsluna hjá felagnum komandi árini. Atlantic Petroleum hevur gjørt avtalu um at keypa 25% í olju & gass leiðunum Orlando og Kells frá bretska felagnum Iona Energy Company (UK) Limited. Felagið hevur fingið góðkent avtaluna um Orlando, meðan hin parturin av avtaluni, sum snýr seg um Kells kelduna fer eftir ætlan at koma endaliga uppá pláss seinni í ár. Her er eisini talan um at keypa 25%. Atlantic Petroleum keypir seg inn í leiðirnar fyri eitt grundgjald á umleið 194 mió. kr. Orlando og Kells leiðirnar verða báðar útbygdar við undirsjóvar íbinding í framleiðslupallin Ninian Central. Væntandi verður fyrsta oljan úr Orlando framleidd seint í 2014, og tá Kells hevur fingið góðkenning seinni í ár er fyrsta framleiðslan væntandi í 2015. Ben Arabo, stjóri í Atlantic Petroleum, sigur, at hetta er eitt týðandi stig fyri felagið at fáa nýggja framleiðslu aftrat uppá stutt sikt. Útbyggingin av Orlando hevur givið felagnum týðandi nýggjar goymslur og fer at økja framleiðsluna í 2014 og komandi árini. Henda íløgan er fult í tráð við strategiina og framleiðsluprofilin hjá felagnum. Orlando verður fjórða keldan hjá Atlantic Petroleum, sum fer undir framleiðslu. Vit síggja nú fram til góðkenningina av Kells oljuleiðini seinni í ár við tí stavnhaldi at fara undir fyrstu framleiðsluna har í 2015, sigur Ben Arabo. ?